Nýggir filmar þesa vikuna

Støð
Filmsheiti, **Dagur/ar (klokkutíð)**

Svf
Tann fremmandi – am. filmur, **19.** ***(21.25)***
Chato's Land – br.kovboyfilmur við Charles Bronson - Óhóskandi fyri børn, **19.** ***(22.55)***
Happy, Texas – am. skemtifilmur, **20.** ***(19.45)***
Backbeat – bretskur tónleikafilmur, **20.** ***(21.20)***
Mussa ella myrð – avstr. roadmovie spenningsfilmur - Óhóskandi fyri smábørn, **20.** ***(23.55)***
Sjey ár í Tibet – arg./am. filmur, **21.** ***(20.55)***
La strada – it. klassikari, **23.** ***(21.20)***

3+
Junglebogen - Mowgli og Baloo, **19.** ***(20:00)***
Kjøtsins lystir, **20.** ***(22:40)***
Skatturin, vit hava krympa okkum sjálvi, **20.** ***(11:45)***
The Last Marshall, **22.** ***(20:50)***

Canal+
Cecil B. Demented, **19.** ***(19:00)***
Chok 8 - På godt og ondt, **22.** ***(3:20)***
Dragerne over Helsingfors, **24.** ***(19:00)*** **25.** ***(9:35)***
Ignition, **25.** ***(19:00)***
Joe Somebody, **23.** ***(19:00)*** **25.** ***(13:40)***
Serendipity, **20.** ***(19:00)*** **21.** ***(9:20)***

Canal+Gul
Ocean's Eleven, **19.** ***(23:20)***
Serendipity, **22.** ***(9:35)*** **24.** ***(20:00)***
Three Strikes, **19.** ***(22:00)***

DR 1
Apollo 13, **19.** ***(20:40)***
Beethovens Anden, **20.** ***(19:40)***
Columbo: Ein drápsligur fjeppari, **20.** ***(21:05)***
Harlequin: tvíburðurin hjá modellini, **22.** ***(21:00)***
Route 9 - deyðans spor, **19.** ***(22:55)***

DR 2
Einasti sannleikin, **25.** ***(19:25)***
Síðsta nátt við klikuni, **21.** ***(16:56)***

Hallmark
Sworn To Vengeance, **22.** ***(23:00)***

TCM
Tom Edison sum drongur, **23.** ***(8:15)***

TV 2 zulu
Á alljósum degi, **19.** ***(22:45)***
Baronessan frá bensinpumpuni, **22.** ***(14:15)***
Deyði við komuna, **19.** ***(11:10)***
Halgimenni - Vendetta for the Saint, **21.** ***(11:15)***
Hamburger Hill, **25.** ***(20:00)***
Lion the Streetfighter, **19.** ***(19:55)***
Sherlock Holmes: Secret Weapon, **25.** ***(11:05)***
Sherlock Holmes: Terror by Night, **23.** ***(11:00)***

TV 3
Davids bog, **22.** ***(20:25)***
Øri professarin, **20.** ***(20:00)***

TV-1000
Corto Maltese í Sibiria, **19.** ***(4:00)***
Halloween: Resurrection, **21.** ***(19:00)*** **24.** ***(21:00)***
Slim Slam Slum, **23.** ***(19:00)***
The Fisher King, **22.** ***(19:00)***
The Grey Zone, **25.** ***(19:00)***
The One, **20.** ***(19:00)*** **25.** ***(21:00)***
Tron, **19.** ***(3:30)***

TVDanmark1
Alaska, **21.** ***(19:00)***
Fangalega í helviti, **20.** ***(22:55)***
Handan forsíðuna, **20.** ***(21:00)***
Romeo Must Die, **24.** ***(20:00)***
The Jack Bull, **25.** ***(20:00)***

TVDanmark2
Addicted, **20.** ***(19:05)***

Fríggjadag 19. kl. 18.00



The Simpsons
Hugsjónska Lisa meldar seg inn í eitt vegetarfelag "Dirt First". Hon hevur sæð tey mótmælt á toppinum á tí lokala Krusty Burgerhandlinum. Fyri at vísa at hon meinar tað, er hon noydd at sova úti í skóginí, uppi á einum stórum redwood-træi. Og Bart ætlar at keypa eina spælimaskinu, sum hann hevur sæð í sjónvarpinum

Fríggjadag 21. kl. 18.45

Temakvøld: Tá vit søgdu NEIN
Tað snýr seg um morð, avrættingar og tortur. Alt hetta var ein partur av gerandisdegnum í Danmark undir krígnum. Danir gjørdu uppreistur móti samstarvspolitikkinum hjá stjórnini við hersetingarmaktina.

Fríggjadag 19. kl. 20.40

Stjørna eitt kvøld
Stjørna eitt kvøld er aftur á skránni! Dómararnir sita í sofuni, tónleikararnir bíða aftanfyri forhangið, og Natasja Crone er til reiðar at presentera luttakararnar, sum skulu syngja og kýta seg á pallinum fyri dønum og føroyingum.

Fríggjadag 19. kl. 20.45



Tann 13. stríðsmaðurin
Í árinum 922 verður tann mentaði arabiski diplomaturin Ahmad Ibn Fadlan Fadlan(Antonio Banderas) tikin uppí ein flokk av villum norðurlendskum víkingum, tá hann er á veg úr Bagdad. Hann fer við hesum villu og ómentaðu víkingunum norðureftir fyri at hjálpa Hrothgard kongi at stríðast ímóti óndum og blóðtystum skapningum.

Leygardag 20. kl. 15.00



Tipslørdag, beinleiðis: FCK-Herfølge
Tipslørdag á 3+ vísir donsku SAS Liga dystirnar. Áðrenn dystin eru nógv spennandi fótbóltsinnsløg, eins og í sjónvarpsstovuni hjá Dan Sørensen altíð er ein ella fleiri viðkomandi gestir út danska fótbóltsheiminum. Her finnast eisini møgulig tips og hentleikar til tipskupongina og oddset, og eisini er ein stór SMS-kapping.

Leygardag 20. kl. 20.50

Kate & Leopold
Kate Mckay (Meg Ryan) er ein suksessfull handilskvinna úr 21. øld. Leopold(Hugh Jackman) er ein sjarmerandi, einligur aðalsmaður úr 18. øld. Ein dagin uppdagar fyrrverandi drongur hennara einar dyr, ið leiða hann aftur til 19. øld. Her møtir hann Leopold, sum kemur við honum til New York í 21. øld. So møtir Leopold Kate...

Leygardag 20. kl. 21.00

Alistair McGowan hermir
Ein av heimsins mest gávaðu skemtarunum við stand-up og sketjum. Alistair McGowan er á odda í hesi skemtiröðini. Her hermir hann óvæntað eftir persónum, sum t.d. Woody Allen, Robbie Williams, Gary Lineker og "The Students Grants" — Hugh, Cary og Richard E — sum allir deila eina íbúð við Audrey Hepburn (Ronnie Ancona).

Leygardag 20. kl. 23.55

Mussa ella myrð
Nikki og Al, sum eru góð, koma illa fyri tá ein maður, tey ræna pening frá, doyr av doyvingini, tey gera honum. Tey flýggja út í oyðimørkina, og bæði løgreglan og ein maður, tey hava hótt við at avdúka sum pedofilan, eru í hølunum á teimum.

Sunnudag 21. kl. 15.55

Premier League: Manchester United - Arsenal
Sera spennandi toppdystur millum favorittarnar í Premierleague. Arsenal og Manchester United bresta saman. Her vera fleiri av bestu leikarunum í Premier League at siggja, so sum Cristiano Ronaldo, Ruud Van Nistelrooy, Dennis Bergkamp og Thierry Henry.

Sunnudag 21. kl. 18.00

Big Brother - Frumsýning
Sokallaða "heimsins størsta sjónvarpsfyribrigdið", Big Brother byrjar aftur! 12 nýggir sambúgvar er útvaldir og til reiðar at fara inn í eini nýggj hús í Mileparken í Skovlunde. Tann sálarligi spenningurin byrjar aftur. Veitsla verður bæði innan og uttanfyri húsið í Skovlunde.

Sunnudag 21. kl. 19.50

Charlie´s Angels
Tær triggjar smartu, kulu og vælvandu Charlie´s Angels eru aftur og hesaferð við hátøkniligari útgerð. Stovnarin av Knox Technologies, Eric Knox, hevur uppfunnið eina ritgerðarstýring, ið kann kenna persónar aftur á teirri rødd. Men um útgerðin fellir í skeivar hendur kann tað ganga ræðuliga galið. Og so verður Eric Knox burturfluttur.

Sunnudag 21. kl. 20.55

Sjey ár í Tibet
Tann ungi eysturríkarin og ævintýrarin Heinrich Harrer fer í 1939 heimanífrá og frá konuni, sum er við barn, fyri at klintra niðan á fjallið Nanga Parbat í Himalaya. Tá kríggj brestur á í Evropa, verða Harrer og ein annar klintrari settir í krígsfangalegu men teir flýggja.

Mánadag 22. kl. 18.00

Frasier
Frasier heldur eina veitslu fyri starvsfólkunum á útvarpsstøðini. Hetta er ein roynd í at betra um sitt umdømi millum fólk. Samstundis er Roz úti við einum skrellimanni og Niles hugsar aftur á síni barndómsminnir við Daphne.

Mánadag 22. kl. 21.30

Parkinson
Michael Parkinson er vertur í virðisløntu undirhaldssendingini, har prát við kend fólk er í miðdeplinum. Gestirnir hesuferð eru: Charlotte Church og so er eisini Lionel Richie, ein av størstu sangskrivarunum nakrantíð. Hann spælir eisini nakrar av sínum bestu sangum í sjónvarpshølunum.

Mánadag 22. kl. 19.00

The Fisher King
Ein gátukend søgu um frígering í einum býi, ið ongantíð svevur; New York. Útvarpsverturin Jack Lucas(Jeff Bridges) hevur ikki serliga nógv til yvirurs fyri sínum næstum og hetta smittar av á lurtararnar. Ein sera iðin lurtari ger orð til verk - til morð. Jack fer at drekka illa og røkkir botnin. Her møtir hann Parry(Robin Williams).

Mánadag 22. kl. 22.50

Mótasýning úr Rom
Her ber til í góðari tíð at fróða seg um mótan, sum kemur í vár. Í sendingini hitta vit sniðgevararnar Gattinoni, Raffaella Curiel, Lorenzo Riva, Egon Furstenberg, Ranato Balestra, Gai Mattiolo, Fausto Sarli, Yumi Katsura, Escada. Harumframt vísa sniðgevar uppskot fram.

Týsdag 23. kl. 18.30

Will og Grace
Grace ger seg kláran til eina deyt við ongum øðrum enn hennara fyrrverandi forlovaða, Danny. Will ger alt fyri at forða hesum, men hon er avgjørd. Dagin eftir sigur hon, at hon aftur er við at gerast góð við Danny. Will bøgst sjokkeraður og er ikki tryggur í sínum kenslum mótvegis Grace. Hann biðir Grace flyta út.

Týsdag 23. kl. 20.00



Pushing Tin
At vera flúgvileiðari á eini stórari floghavn er ofta eitt nervatirrandi starv, men Nick Falzone hevur skil á øllum. So, tá tann legendariski flúgvileiðarin Russell Bell gerst samstarvsfelagi, verða Russell og Nick eisini kappingarneytar á øllum økjum.

Týsdag 23. kl. 20.00

Absolutely Fabulous - New Best Friend
Virðislønt undirhaldsrøð, sum gongur fyri seg í almenna mótaheiminum. Við spæla Jennifer Saunders og Joanna Lumley. Ein gamal vinur hjá Edina kemur at búgva saman við hennara manni og barni. Patsy er øvundsjúk, Edina og Patsy byrja at kappast um, hvør av teimum kann fáa tann mest kenda persónin til vin.

Týsdag 23. kl. 21.20

La strada
Zampano keypir ta góðvarnu og eitt sindur seinføru Gelsomina fyri 10.000 lire. Gelsomina roynir at nærkast harðrenda ognarmanni sínum, men hann leggur neyvan merki til hennara. Og ein dagin hittir Gelsomina ein akrobat í einum sirkussi og hann tosar við hana heilt annarleiðis.

Mikudag 24. kl. 20.00



Dagar við Kahtrine
Við fyrsta egnakast er Kathrine helst tað fleiri vildu sæð sum ein tapara. Hon manglar sínar tenn, er miðaldrandi og alkoholikari. Hon fær overførelsesindkomst og er av og á heimleys og er hon grønlendari. Men Kathrine er eitt av teimum vakastu menniskjunum ein kann møta. Ulla Boye hevur gjørt hendan dokumentarfilmin.

Mikudag 24. kl. 20.30

Eydnubollin Seroxat
Heilivágurin móti tunglyndi, Seroxat, er næstan líka so væl umtóktur sum Prozac. Virkið, sum framleiðir bollan heldur upp á, at hann ongi hjáárin hevur givið teimum milliónunum av fólkum, sum hava tikið hann. Men túsundtals fólk halda uppá, at tey eru bundin.

Mikudag 24. kl. 21.00



Romeo Must Die
Fyrrverandi løgregluмaðurin Han Sing situr inni í einum harðrendum gegli, tí hann ikki vil avdúka sín pápa og bróður, ið hoyra til undirheimin. Han Sing flýggjar og ferðast yvir til Amerika, har hansara bróðir er blivin eitt offur í einum stríði millum tvær ráðandi familjur í undirheiminum - tann eina afroamerikansk og hin kinesisk, leidd av pápanum.

Mikudag 24. kl. 21.15

Vaksnir sekslingar
Ein tanáringur í heiminum kann vera torført. Tveir krevur tol. Trýggir tanáringar í heiminum er næstan ótolandi. Men seks tanáragentur á júst tí sama aldrinum, tað krevur sín mann og kvinnu. Í 1983 skaptu Janet og Graham Walton eina heimssensatión, tá tey gjørdust foreldur at sekslingum, ið allir vóru gentur.

Hósdag 25. kl. 20.00

Biker Jens - Wrestlari í USA
Kósin verður sett móti Hazelton - ein provinsbýur í Pennsylvania statinum. Her skal hann møta nøkrum av teimum hørðu dreingunum í USA. Her liggja nemmliga teir mest virdu wrestlingskúlarnir, nokk eisini tað einasta sum býurin er kendur fyri. Hansara fordómar um at tað heila er sjónleikur, verða javnaðir við jørðina, tá hann stendur í ringinum.

Hósdag 25. kl. 20.00

Jerry Maguire
Ítróttaagenturin Jerry Maguire(Tom Cruise) er á toppinum í beinhørðu vinnuni, har ítróttatalentir verða seld sum seyður fyri stórar upphæddir til hægstbjóðandi. So við og við fær Jerry samvitskubit yvir sín hátt at arbeiða á. Hann ger eitt handrit har hann staðfestir ein meiri menniskjasligan arbeiðshátt. Av hesum missir hann starvið.

Hósdag 25. kl. 21.00



A History of Britain - The Two Winstons
Síðsta sendingin í dokumentarröðini um søgu Bretlands. Sendingin kannar støðuna hjá landinum gjøgnum tveir veraldarbardagar og ein eftirfylgjandi ótryggan frið. Tveir kendir persónar frá tí tíðini eru Winston Churchill og George Orwell, hesir høvdu ymiskar meiningar um tí umtalaðu støðu.

Hósdag 25. kl. 22.00

Krimitímin: Dalziel & Pascoe 1:2
Ein hópmordari, sum dámar væl at lesa Shakespeare ger um seg í økinum. Tá ein ung kona verður funnin kvald, bendir alt á, at sami maður er uppi í, og skjótt ringir ein ókendur maður til blaðið í býnum og lesur eitt brot úr Hamlet upp í telefonini.

Leygardagin kl. 17.00

Sjómanssendingin Vitin

Annika, Alfred og børnini við Skipá, hava verið í uml. eitt hálvt ár umborð á hjálparskipinum Anastasis í Vesturafrika. Vit hoyra um nógvar syrgiligar menniskjalagnur. Kríggj hevur leingi herja í Sierra Leone, men tey hava fingið ein møguleika til at veita hjálp, av Guðs náði.

Børnini Maria, Tummas og Katarina eru sera glað fyri tíðina umborð á skipinum. Tey fingu undirvísing, og luttóku í hjálpararbeiðinum á ymiskan hátt.

Hoyri hvussu fólk við stórum kreftsvulstum, haruskarðum og øðrum vórðu skorin, og fingu eitt nýtt lív.

Símin Hansen leggur sendingina til rættis.

Sunnudagin kl. 13.10

Seyður og røkt
Tjørnuvíkingar eiga Sjeydirnar. Óivað kemur besti seyður í landinum haðani. Men hvussu verður hesin óvanliga fruktargóði hagin skipaður og røktur? Prátað verður við røktingarmenninar Dagbjart Andreasen og Steinbjørn Magnussen.

Ítróttur

Leygardagin kl. 15.00
SAS-ligan: FCK-Herfølge
Leygardagin kl. 18.00
SAS-ligan: OB-Brøndby

Leygardagin kl. 12.25
Premier League: Wolves-Chelsea
Leygardagin kl. 14.45
Premier League leygardagur
Sunnudagin kl. 16.00
Premier League: Manchester Utd.-Arsenal

Leygardagin kl. 19.25
Seria A
Sunnudagin kl. 19.25
Seria A

Speedway Grand Prix úr Kekkia
Speedway Grand Prix úr Pólandi

Mikudagin kl. 19.00
UEFA-Cup OB-Reyða Stjørna

Sunnudagin kl. 14.35
V5-Travet

Roadracing úr Rio de Janeiro, Brasilia
Motorsport úr Oschersleben, Týskland
Súkkling Vuelta Espana
HM fótbóltur hjá kvinnum úr USA
EM Flogbóltur Pólland-Holland, kvinnur
WTA Tennis úr Shanghai, Kina
WTA Tennis úr Leipzig, Týsklandi
Nevaleikur úr Reno, USA

Sunnudagin kl. 20.55
NFL San Francisco 49'ers-Cleveland Browns
Týsdagin kl. 17.55
Hondbóltur Noreg-Svøríki, menn
Mikudagin kl. 16.50
UEFA-Cup Brøndby-Victoria Zizkov
Mikudagin kl. 20-25
Hondbóltur Scandinavian Open, finala
Súkkling Vuelta Espana

Leygardagin kl. 13.55
Bundesligan: Bayern München-Bayer Leverkusen

Golf Linde Masters úr Köln, Týsklandi
Fótbóltur Hollendska heiðursdeildin
HM Billard

VARPIÐ
Eykablað í Sosialinum
hvønn fríggjadag

Postsmoga 76
110 Tórshavn
Telefon: 311820
Fax: 314720
e-mail: varp@sosialurin.fo

Útgáva: Sosialurin
Umbróting: Hestprent
Prent: Prentmiðstøðin